# MIÐFLOKKURIN

hvørt vikuskifti í Sosialinum

- Fólksins flokkur
- Sosialur
- Familjuvinarligur
- Grundfastur
- Trúfastur
- Verjir virðini

MIÐFLOKKURIN SJÁLVANDI



Jaspur Langgaard

## Profilurin

**Navn:** Jaspur Langgaard
**Aldur:** 37 ár
**Bústaður:** á Nesi, Eysturoynni
**Maki:** Giftur við Oliviu Langgaard
**Børn:** Remi 15 ár og Beinir 7 ár.

**Hjartamál:**
Eg havi frá heilt ungum árum haft stóran áhuga fyri politikki. Eg havi altíð trúð, at tað hevði verið best fyri okkum sum tjóð, um vit stóðu á egnum beinum og at vit høvdu eitt gott samstarv við okkara grannar á jøvnum føti.

Gjøgnum mítt arbeiði sum aðalskrivari í Bláa Krossi Føroya, havi eg sæð at børn heilt á ungum árum ynskja at royna rúsdrekka og rúsevnir. Gransking í grannalondum hevur staðfest, at jú fyrr børn byrja at nýta hesi evni, størri er vandin fyri, at tey seinni vilja vera bundin at hesum. Miðflokkurin hevur sett sær fyri, at børn og foreldur í Føroyum skulu vera meir tilvitað um hesar vandar, og at vit sum samfelag eiga taka hetta í fullum álvara.

**Hví velur tú miðflokkin?:**
Tað hevur glett meg, at búð í eini tjóð, sum hevur virðismett tey átrúnaðarligu virðini sera høgt. Tíverri upplivi eg at flestu flokkar siga, at politikkur og átrúnaður ikki kunnu ganga hond í hond. Her hevur Miðflokkurin melda greitt út, og tí havi eg valt at blíva partur av hesum flokki.

**Visti tú at?**

- At Miðflokkurin í seinastu samgongu forðaði liberaliseringum í rúsdrekkalógini, sum tíverri eru framdar undir hesari samgonguni við øktari nýtslu sum fylgju.
- At Miðflokkurin sum einasti flokkur vil hækka aldursmarkið fyri keyp av rúsdrekka.
- At Miðflokkurin var við til at leggja uppskot fram um eina rúsevnis-nullloysn fyri Føroyar.
- At Miðflokkurin aktivt virkar fyri at bøta um umstøður teirra heimleysu.

www.midflokkurin.fo

SUNDA KOMMUNA

# Pedagogar til dagstovnarnar

sansir.fo

**Søkt verður eftir**

- fýra pedagogum til Dagstovnin á Flatinum á Oyrarbakka til barnagarðsstovurnar og frítíðarskúlan
- tveimum pedagogum til Barnagarðin við Kráir í Hvalvík
- einum pedagogi til Frítíðarskúlan í Hvalvík
- tveimum pedagogum til Dagstovnin við Stórheygg í Hósvík

at byrja eftir summarfrítíðina. Øll størvini eru 30 t/v ella eftir nærri avtalu.

**Vit ynskja, at tú hevur**

- hug at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag fyri børnini
- virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teimum vaksnu
- hug til at skapa og seta dám á dagstovnin
- góð samstarvsevni og kann arbeiða sjálvstøðugt

**Vit bjóða**

- eitt spennandi arbeiðspláss, har pláss er fyri ymiskleika
- ein stovn, ið er í støðugari menning
- eitt arbeiðspláss, har tú kemur at hava ávirkan

**Setunarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað størv

**Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til**

- Dagstovnin á Flatinum: Rosu Prestá, leiðara, á tlf. 771030 ella 471030
- Barnagarðin við Kráir: Nancy Poulsen, leiðara, á tlf. 772021 ella 422717
- Dagstovnin við Stórheygg: Honnu Thøgersen, leiðara, á tlf. 772020 ella 472020

Umsóknir við avritum av prógvi v.m. skulu sendast til

Sunda kommunu
Oyrarbakkavegur 3
400 Oyrarbakki

ella við telduposti til: sunda@sunda.fo

Umsóknir mugu vera okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 19. juni 2007

Í Sunda kommunu eru tríggir dagstovnar: Á Oyrarbakka, í Hvalvík og í Hósvík. Dagstovnurin á Flatinum á Oyrarbakka hevur pláss fyri 108 børnum, og har starvast í løtuni 22 fólk. Barnagarðurin við Kráir í Hvalvík hevur pláss fyri 60 børnum, og har starvast í løtuni 13 fólk. Dagstovnurin við Stórheygg í Hósvík hevur pláss fyri 58 børnum, og har eru í løtuni 11 starvsfólk. Leiðararnir á teimum trimum dagstovnunum hava eitt gott og tætt samstarv í samráð við kommununa.


Handilsfyritøkan Kaj Andreasen & Co er stovnað í Tórshavn í 1970. Fyritøkan útvegar maskinur og útgerð til byggivinnuna og útgerð til fiskiog alivinnuna, skip og bátar.

## HANDILSLÆRLINGUR
### Vit søknast eftir handilslærlingi

Eitt spennandi starv, har viðkomandi við tíðini sleppur at royna seg innan vørukeyp, ger av tilboðum og sum heild vera ein partur av arbeiðinum at halda handilshølini snotulig.

Uppgávurnar koma at fevna um :
- Avgreiðslu av viðskiftafólki
- Røkt av handlinum
- Bílegging av vøru
- Annað fyrifallandi arbeiði

Tað er ein fyrimunur um umsøkjarin hevur áhuga og kunnleika til maskinur, men er hetta ikki eitt krav.

Um tú heldur, at hetta er nakað fyri teg, so send okkum umsókn við møguligum viðmælum.

DIMMALÆTTING 341200

Kaj Andreasen & Co
HEILSØLA - SMÁSØLA - UMBOÐ - ÚTLEIGAN
Brekkutún 7 - Postboks 1200 - 188 Hoyvík
tel 31 56 00 - fax 31 80 08
T-postur: info@andreasen.fo - Heimasíða: www.andreasen.fo



# LOYSNIN!

...ein lykil til alt húsið, virkið ella skúlan !!

Vit loysa lás- og lyklatrupulleikar.

Vit eru serkønir í at gera:

Ruko systemlás · Skipan av lásum
Umvælingar · Skera lyklar til · Umskipa

TÓRSHAVNAR LÁSASERVICE
v/Jahn Petersen
TEL 310 411 · FARTEL 215 411
teldupostur: lasasmid@post.olivant.fo

veitst tú ikki tað?
Sosialurin